

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 07 - 2012

# Rimmar úrslit hjá Statoil

Norski oljurisin Statoil hevði heilar 62 milliardir norskar krónur í avlopi í 2. ársfjórðingi. Tað er tvey prosent meiri enn í sama tíðarskeiði í fjør. Eftir skatt var avlopið 26,6 milliardir. Hóast oljuprísurin hevur verið fallandi, vóru inntøkurnar 186,5 milliardir krónur, sum er 17 prosent meiri enn í 2. ársfjórðingi í 2011. At inntøkan kortini er vaksin kemst av, at gassið hevur verið dýrari, og harafturat framleiddi felagið nógv meiri olju og gass í 2. ársfjórðingi í ár enn somu mánaðum í fjør. Olju- og gassframleiðslan í 2. ársfjórðingi kom upp á 1,98 millión tunnur um dagin. Gassframleiðslan var heili 33 prosent størri og oljuframleiðslan 8 prosent størri enn í somu mánaðum í 2011. Framleiðsluvøksturin á norskum øki var 11 prosent. 100 mia. til íløgur Statoil hevur stórar ætlanir fyri árið í ár. Málið er at fullføra 45 leitibrunnar í hesum árinum, og íløgurnar verða 18 milliardir dollarar ella góðar 100 milliardir krónur. Málsetningurin hjá felagnum er, at í 2020 skal framleiðslan vera komin upp á 2,5 milliónir tunnur um dagin, og vøksturin skal felagið fáa frá nýggjum verkætlanum. Metingin hjá Statoil fyri 2013 er, at framleiðslan verður tann sama sum í ár. Mynd - Helge Lund, samtaksstjóri hjá Statoil saman við Rúna M. Hansen, stjóra í Statoil Exploraiton í Føroysum, sum seinastu árini eisini hevur staðið á odda fyri oljuleiting í Norðureuropa og sum herfyri gjørdist leiðari av arktisku deildini hjá Statoil. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller